


www.oljan.fo

**Jan Müller** 23 - 08 - 2013

# Tyrla neyðlendi við Hetland- 15 bjargað - leita eftir trimum

Tað verður framvegis leitað eftir trimum fólkum, sum vóru við eini Super Puma tyrlu, ið mátti neyðlenda vestan fyri Hetland fyrr í kvøld. Við tyrluni, sum kom frá Borgny Dolphin boripallinum, ið arbeiðir fyri oljufelagið Total á gassleiðunum miðskeiðis millum Hetland og føroyska markið. Við tyrluni vóru 16 oljuarbeiðsmenn og tveir pilotar. 9 fólk vórðu stutt eftir tikin upp frá av bjargingartyrlu og fluttir til eitt sjúkrahús í Lerwick. Aðrir seks eru eisini bjargaðir, meðan tríggir persónar enn ikki eru komnir afturíaftur. Tyrlan varð stutt frá Sumburgh flogvøllinum, tá óhappið hendi. Veðrið hevur ikki verið nakað serligt, eitt nú hevur verið nógvur mjørki og nakað av vindi. Tyrlan fleyg fyri felagið CHC. Sama felag hevur verið úti fyri tveimum líknandi óhappum seinastu árini, har neyðlent hevur verið á sjónum men har eingin er komin til skaða. Keldur: BBC Skotland, News BBC, ITV News, The Guardian Myndir Bjargingartyrla kemur til Lerwick við nøkrum av fólkunum frá vanlukkuni Myndir STV News